# Um sundurbýti av Nes sóknar kommunu lýst við dømum frá øðrum kommunubýtum

*On the subdivision of the local authority district of the parish of Nes with examples from other district subdivisions.*

*Eftir Johan Djurhuus.*

## *Lóggávan.*

Galdandi løgtingslóg um føroysku kommunurnar, eisini Tórshavnar kommunu, er løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972. Lógin setur úr gildi lóg nr. 30 frá 28. februar 1872 »om de færøske landkommuners styrelse« og lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 »om byen Thorshavns kommunale styrelse«, Tórshavn varð tó kommuna longu við lóg frá 16. februar 1866 um »byen Thorshavns økonomiske styrelse«.

Hundrað ár eru millum tær báðar fyrru lógirnar. Í hesum tíðarbili henda stórar broytingar í føroyska samfelagnum, mentunarliga, fíggjarliga og eisini á tí politiska økinum. Men lóggávan um kommunala sjálvstýrið verður lítið broytt í tekstinum og í innihaldinum hesi 100 árini. Í lógini eitur stovnurin, ið situri fyri kommunala sjálvstýrinum, óbroytt øll árini »forstanderskab«, meðan vanliga nýtta orðið millum manna, ið hvussu er seinastu árini, fyrst verður »sóknarstýri« og síðani »kommunustýri«. Navnabroytingin er ikki bert ein málslig broyting, men ein broyting, ið lýsir, hvat hent er í kommunala sundurbýtinum av landinum, at kommunurnar frá at vera prestagjaldskommunur, sum tíðin gekk, eru býttar í sóknarkommunur og eisini smærri. Í hesi grein verður orðið »kommunustýri« nýtt fyri »forstanderskab« ella »sóknarstýri«.

Ein av mununum millum tær báðar lógirnar er, at meðan hin eldra sigur, hvussu fram skal farast, tá ið kommuna skal býtast, men einki sigur um samanlegging av kommunum, so er øvugt við tí nýggju lógini, hon hevur bert reglur um samanlegging, jbr. § 48, 2. stk., og ongar um sundurbýti.

Tað kundi verið áhugavert at kanna, hvørjar grundirnar hava verið fyri tí, sum fram er farið undir tí gomlu kommunulógini í hesum spurningi. Í hesi frágreiðing verður tó serliga umrøtt seinasta kommunubýti eftir lógini, sundurbýtið av Nes sóknar kommunu, men eisini uttan tó at fara út í æsir hvørjar grundir løgtingið hevur lagt undir avgerðirnar, annaðhvørt tær eru tilskilaðar í sjálvari lógini ella grundgevingin hevur verið at loysa eitt mál, ið skuldi loysast.

*Áheitan um býti av Nes sóknar kommunu.*

Nes sókn var eftir lógini frá 1872 undir Eysturoyar prestagjalds sóknar kommunu ella Eysturoyar sýsla. Tá ið landsstýrið í 1965 fær áheitan um at býta Nes sóknar kommunu sundur, er prestagjaldskommunan býtt í 11 kommunur. Nes sókn og Gøtu sókn verða í 1897 býttar frá sum ein kommuna[1], og verða hvør sær kommuna í 1912[2]. Nes sóknar kommuna umfataði í 1965 bygdirnar Glyvrar, Lamba, Nes, Rituvík, Runavík, Saltangará, Saltnes, Skipanes, Søldarfjørð, Toftir og Æðuvík. Kommunumarkið móti øðrum kommunum fylgdi hagamarkinum.[3]

[4] 7. apríl 1965 fær landsstýrið skriv undirskrivað av 7 monnum, sum vegna íbúgvarnar á Nesi, á Toftum, í Saltnesi og í Æðuvík krevja, at Nes sóknar kommuna verður tikin sundur soleiðis, at hon bert umfatar hesar bygdir. Síðani verður send landsstýrinum adressa um tað sama, undirskrivað á Toftum dagfest 2 juli sama ár, á hesi adressu eru 279 undirskriftir; tilskilað er tó ikki, hvar teir, ið undirskrivað hava, búgva.

28. oktober 1965 er kravgonga í Tinganesi um at býta kommununa sundur.

Landsstýrið hevði framman undan kravgonguni sent kom-

munustýrinum bæði skrivið og adressuna til ummælis. Kommunustýrið svarar aftur 29. oktober 1965 »....at vegna umstøðurnar, og soleiðis sum málið er komið at liggja fyri við tað, at umleið 160 menn úr nevndu bygdum tann 28. oktober 1965 fóru til Havnar og gingu kravgongu út í Tinganes til landsstýrið og kravdu sóknarslit, kann stýrið mæla til, at fólkaatkvøða verður hildin í allari sóknini samsvarandi § 1 í kommunulógini frá 1872, og heitir kommunustýrið á landsstýrið um at taka støðu til, nær slík fólkaatkvøða kann fara fram og eisini seta reglur fyri, hvussu hon skal verða løgd til rættis.« Í skrivinum verður skilað til, at av teimum 7 kommunustýrislimunum vóru teir 6 á fundi, og atkvøddu allir fyri skrivinum.

Teir 7, sum av fyrstani venda sær skrivliga til landsstýrið, og sum síðani nevna seg »borgaranevndin«, heita aftur á landsstýri í skrivi 3. november, og siga seg valdar av fólkinum í teimum 4 bygdunum. Hvat markinum viðvíkur heldur borgaranevndin, at hagamarkið, sum vanligt hevur verið, verður markið millum nýggju kommunurnar.

Landsstýrið ger so av, at fólkaatkvøða skal vera í allari kommununi, og, aftaná at hava fingið ummæli frá kommunustýrinum, at fólkaatkvøðan verður hildin í hvørjari bygd sær, soleiðis at vissa fæst fyri, hvørja støðu tær ymsu bygdirnar taka. Ein minniluti í kommunustýrinum, teir sum vóru fyri kommunubýti, helt tó, at um fólkaatkvøða skuldi verða, so átti hon bert at verða í tí ytra partinum, frá markinum millum Toftir og Glyvrar og eystureftir.

Aftan á samráðingar millum landsstýrið og kommunustýrið ger landsstýrið av:

*at* fólkaatkvøðan skal verða 21. desember 1965, og

*at* hesar bygdir skulu atkvøða hvør sær: Nes, Toftir og Saltnes, sum annars, tá ið talan er um vanligt val, atkvøða saman, allar tríggjar í Tofta skúla, Runavík, Saltangará og Glyvrar, sum eisini annars hava sama valstað, allar í Glyvra skúla, Søldarfjørður (saman við Skipanesi), Rituvík, Æðuvík og Lamba.

*Var fólkaatkvøða neyðug?*

Hóast ein fólkaatkvøða, um hon var fyri býti av kommununi, ikki eftir reglunum bant landsstýrið, eftir lógini var fólkaatkvøðan bert vegleiðandi, so hevði landsstýrið, tá ið tað læt málið til fólkaatkvøðu, í veruleikanum tikið støðu fyri at býta, um úrslitið var nóg greitt tann vegin.

Eftir lógini, jbr. § 1, skuldu tvær fyritreytir vera loknar at býta kommunur sundur, hin fyrra, at umstøðurnar skuldu tala fyri, og hin seinra, at meiriluti av veljarunum var fyri.

Viðv. seinru treytini gjørdi landsstýrið eftir tilmæli frá kommunustýrinum av, at veljaraviljin skuldi vísa seg í eini fólkaatkvøðu. Her kann tí verða spurt, um tílík mannagongd hevur verið vanlig í teimum kommunubýtum, ið fram eru farin undir lógini.

Við at kanna 24 kommunubýti í Løgtingstíðindum, sum í flestum førum gjølliga greiða frá hesum málum, er einki at ivast í, at løgtingið hevur lagt miklan dent á at fáa vissu fyri at ikki varð býtt, fyrr enn ein meiriluti av veljarunum ynsktu at býta og í allarflestu førum kravdist eisini viðmæli frá sóknarstýrinum, 16 dømi eru í so máta[5].

Í einum av hesum dømum, var løgtingið tó í iva, um tørvandi meiriluti var, tað var í býtinum í 1912 av hini sameindu sóknarkommununi í Norðstreymoy, tá kommunan skuldi býtast í Kvívíkar, Haldórsvíkar, Hvalvíkar, Kollafjarðar og Saksunnar kommunur[6], Vestmanna var farin frá í 1892. Her sigur løgtingið, at hóast ein meiriluti av veljarum í Haldórsvík ikki hevur skrivað undir, so er løgtingið fyri at býta, tí meiriluti er annars í bygdunum, og kommunustýrið mælir til. Haldórsvík og Saksun vórðu tó lagdar saman í kommunur.

Í 3 førum er bert talan um ein meiriluta av veljarum, einki er beinleiðis sagt um, hvørja støðu kommunustýrið hevur tikið, men býtt verður[7].

Í tveimum førum gongur løgtingið ímóti, tí meiriluti av veljarunum ikki hevur skrivað undir áheitanina um býti, og einki viðmæli er frá kommunustýrinum. Fyrra dømi er frá

1912, tá ið talan er um at býta Viðareiðis, Svínoyar og Fugloyar kommunu sundur í Viðareiðis kommunu og Fugloyar og Svínoyar kommunu[8]. Í 1913 eru treytirnar loknar, og verður kommunan tá býtt[9]. Hitt dømi er í býtinum av Hósvík og Hvalvík í tvær kommunur. Málið er fyri bæði í tingsetuni 1924 og í 1925[10]. Tað eru hósvíkingar, ið ynskja býtið, men løgtingið gongur ímóti bæði árini, tí neyðugur meiriluti er ikki í Hósvík, og einki er um, hvat hvalvíkingar ynskja, heldur ikki er kommunustýrið samt. Kommunan verður ikki býtt fyrr enn í 1954. Hinvegin er dømi, men bert eitt, har einki stendur í Løgtingstíðindum um, hvørja støðu veljararnir ella kommunustýrið hevur, tað var í býtinum í 1947 av Oyndarfjarðar kommunu í Oyndarfjarðar og Elduvíkar kommunur[11].

Í øllum teimum kommunubýtum, har meiriluti av veljarum hevur verið fyri, hevur meirilutin við nøkrum undantøkum givið seg til kennar í undirskriftum undir áheitan til løgtingið. Bert í tveimum førum eru funnin dømi um, at løgtingið hevur kravt skrivliga atkvøðugreiðslu, og at atkvøðugreiðsla hevur verið. Bæði eru frá 1918. Annað tá ið Hov skuldi býtast frá Porkeris kommunu[12]. Atkvøðugreiðsla var í Hovi, og úrslitið var, at stórur meiriluti var fyri, tikið varð sundur í 1920[13]. Hitt dømið er, tá ið Haldórsvík vil verða kommuna fyri seg, ikki at vera saman við Saksun[14]. Skrivlig atkvøða verður í Saksun, um teir vilja verða kommuna fyri seg, kommuna saman við Haldórsvík ella kommuna saman við Hvalvík. Av 12 veljarum, ið heima eru, ynskja 9 at greiða atkvøðu, og allir 9 greiða atkvøðu fyri at vera saman við Hvalvík. Einki býti varð tó gjørt tá. Eitt triðja dømi er um, at løgtingið hevur kravt atkvøðugreiðslu, men í hesum døminum varð tó eingin atkvøðugreiðsla. Tað var í 1924, tá Kalbak vildi verða kommuna fyri seg, at verða býtt frá hinum sameindu sóknunum í Suðurstreymoy[15].

Tá ið landsstýrið tók ta støðu, at lata málið um býti av Nes kommunu til fólkaatkvøðu, hóast bert tvey dømi eru at finna í so máta, so hava grundirnar óivað verið tær, at kommunustýrið mælti til, og at áheitanin, hóast hon hevði 279 undir-

skriftir, veljaratalið í Æðuvík, á Nesi, á Toftum og í Saltnesi var 478, var heldur ógreið, hon lýsti ikki nóg væl, hvørjir høvdu skrivað undir. Men ein triðja grundin, og helst nóg so avgerandi, hevur verið, at politikkurin nú fór at halla tann vegin at leggja kommunurnar saman í størri eindir, tí við løgtingslóg nr. 29 frá 27. mai 1966 fekk landsstýrið heimild at seta 5-mannanevnd at kanna kommunalu lóggávuna og møguleikarnar fyri at leggja kommunur saman.

*Umstøðurnar skuldu tala fyri.*

Frammanfyri er nevnt, at umframt tað, at ein meiriluti av veljarunum skuldu standa aftan fyri, so skuldi eftir lógini eisini umstøðurnar tala fyri býti. Í hesi orðingini, hon er heldur leys, tá hon stendur einsamøll, kann leggjast so mangt. Viðmerkingarnar til lógaruppskotið geva tó eina leiðbeining[16].

Tá ið lógin skuldi orðast vóru ymiskar áskoðanir, um kommunurnar skuldu vera av somu støðd sum sóknirnar ella tær skuldu gerast størri, at hvørt prestagjaldið varð ein kommuna. Amtmaðurin, ið evnar fyrsta uppskotið til, helt beinast vera, at býta eftir sóknum, tí eftir hansara metan var tað ein treyt, at nýggja skipanin fekk undirtøku hjá fólki, at hvør sóknin hevði sítt ráð. Innanríkismálaráðið helt hin vegin, at kommunurnar áttu at vera so stórar sum møguligt, soleiðis at tær fáu kreftirnar, ið vóru at taka sær av kommunalum málum, ikki vóru óneyðugt spjaddar. Løgmálaráðið hevði somu fatan. Løgtinginum dámdi ikki at býta eftir sóknum, tó átti beinan vegin at verða havt í huga, uttan tó at nerva býtið í prestagjøld, at hvør sóknin innan fyri prestagjaldið stýrdi sínum fíggjarligu viðurskiftum. Tá ið løgtingið tók hesa støðu, so var grundin ikki bert hon, at langt og torført var frá mongum bygdum hjá limunum at koma til kommunustýrisfund, men ikki minst, at vanliga vildu felags áhugamál bert vera millum tær bygdir, ið lógu næst hvør aðrari og herafturat í somu sókn.

Úrslitið varð býti í prestagjaldskommunur, men tó, sum av løgtinginum mælt til, at í hvørjari sókn kom at sita sóknar-

nevnd vanliga við 3 limum og soleiðis, at hvør sóknin hevði sína fíggjarætlan gjørda av kommunustýrinum, jbr. §§ 15 og 21 í lógini.

Tá ið løgtingið síðani hevur tikið støðu til, um umstøðurnar annars hava talað fyri býti, so hevur tann myndin, sum framgongur av viðmerkingunum til lógina og eisini av sjálvum lógartekstinum, verið havd í huga.

*Vanliga varð býtt eftir sóknarmarki.*

Hóast byrjunarstøðið var prestagjaldskommunur, so kundu áhugamálin sókna millum vera so ymisk, at talan kundi verða um at býta frá, tó vanliga soleiðis, at sókn varð ein kommuna ella fleiri sóknir vórðu lagdar saman í kommunu, men ikki so smátt, at vandi var fyri, at íbúgvarnir í nýggju kommununi ikki vóru førir at røkja uppgávurnar.

Ikki at býta øðrvísi enn at nýggj kommuna kom at falla saman við sóknarmark, hevur sitið rættuliga fast. Tað er eisini nattúrligt, tá ið hugsað verður um, hvussu djúpar røtur aftur í tíðina sóknarbýtið hevur í Norðurlondum[17]. Vit finna býtið longu í íslendsku lógbókini Grágás, skrivað upp í 1118. Har verður tó orðið þing brúkt fyri sókn og kirkjusókn fyri tey, ið hava kirkju saman. Í miðøldini, tá sóknarbýtið er framt, verður merkingin tað øki, har íbúgvarnir hava rætt at krevja ymiskar tænastur frá ávísari kirkju og at verða grivnir á kirkjugarðinum við kirkjuna. Hvør sóknin hevði upprunaliga sín prest, men aftan á trúbótina vórðu, fyri at spara, fleiri sóknir lagdar saman undir sama prest.

Løgtingið hevur yvirhøvur kent seg bundið av kirkjuligu forsøguni; sum dømi kann nevnast, at í tingsetuni 1898 samtykkir løgtingið, at Skopun verður kirkjusókn[18]. Í 1909 verður samtykt at gera Skopun til sókn eisini í kommunalum týdningi, orsøkin er, at kommunustýrið ikki heldur tað vera forsvarligt, at hinar sóknirnar luttaka í útreiðslunum til ætlaðu havnina í Skopun[19]. Skopun fær nú sóknarnevnd og sína fíggjarætlan. Ikki fyrr enn í 1931 verður Skopun kommuna fyri seg[20]. Her

er fyrst stovnað kirkjusókn, síðani sókn í kommunalum týdningi, og sum tað triðja og seinasta stigi, sjálvstøðug kommuna.

Tvey dømi eru tó um, at løgtingið hevur býtt kommunu uttan um sóknarbýti. Fyrra dømi er frá tingsetuni í 1917, tá ið samtykt verður at býta Fuglafjarðar kommunu í Fuglafjarðar og Lorvíkar kommunu, hóast Lorvík tá ikki er kirkjusókn, kirkjan er ikki sóknarkirkja[21]. Seinra dømi er frá býtinum av Oyndarfjarðar kommunu í Oyndarfjarðar og Elduvíkar kommunur í tingsetuni 1947, Elduvík var ikki kirkjusókn, bygdin hevði onga kirkju, men talan var um at byggja kirkju[22].

Eitt serdømi er frá Hvalbiar kommunu. Í 1918 ynskti Sandvík at verða serlig sókn í kommunalum týdningi, men ikki í kirkjuligum, hóast kirkja var í Sandvík[23].

*Tær kommunalu uppgávurnar skuldu kunna røkjast forsvarliga.*

Fyritreytin, at ikki mátti býtast smærri enn, at vissa var fyri, at tær kommunalu uppgávurnar kundu røkjast forsvarliga, sigur løgtingið seg í allarflestu førum at hava ansað eftir, at hon varð hildin. Í trimum førum hevur løgtingið ivast. Í 1912 tá tær sameindu kommunurnar í Norðstreymoy skuldu býtast sundur í 5 kommunur, tá vórðu Haldórsvík og Saksun lagdar saman[6], men tó býttar í 1944[24]. Í 1918 tá Hov skuldi býtast frá Porkeri[12], har varð býtt og í 1929. tá ið Kunoy, Kallsoy og Húsar vórðu býtt í 3 kommunur, har verður víst til, at hesar 3 kommunur eru ikki smærri enn tær býttu sóknirnar í Suðurstreymoyar sameindu sóknum[25].

Bert í einum dømi hevur løgtingið noktað at býta av álvara, tað var, tá ið bóndin á Stóru Dímun í 1909 og eisini í 1910 søkti um, at oyggin varð sókn í kommunalum týdningi, hon var tað frammanundan í kirkjuligum[26]. Her var tó ikki talan um serliga kommunu. Løgtingið noktaði, tí um so varð skuldu teir hava sóknarnevnd, skúlanevnd og valnevnd, og var tað ikki hildið møguligt at manna hesar nevndir. Stóra Dímun varð

tó seinri eftir ynski bóndans flutt kommunalt frá Sandoyar til Skúvoyar sókn við broyting í kommunallógini, jbr. lóg nr. 468 frá 14. desember 1923[27].

*Um býtast skuldi eftir hagamarki.*

Markið um Nes kommunu og Nes sókn var hitt sama, tað fylgdi markinum móti Gøtunum[3]. Talan var tí nú um at býta sóknina í tvær kommunur. Umframt kundi eisini hugsast, nú atkvøðast skuldi í hvørjari bygd sær, at býtast skuldi soleiðis, at nýggju kommunumarkini ikki komu at fylgja hagamarki, síðani tað í eystara partinum av kommununi, Nes og Tofta høgum, eru tríggjar hagaleysar bygdir, Rituvík, Runavík og Æðuvík.

Tað hevur tó hent, at løgtingið hevur býtt uttan at fylgja hagamarki. Argir kunnu helst ikki nýtast sum dømi í hesum samanhangi. Rætt er tað, at Argir eru hagaleys bygd, men frá gamlari tíð hava til gamla Argja-hospitalið ligið 4 hagaleysar merkur[28]. Markið millum bygdina og Kirkjubøar haga varð tí nýtt sum kommunumark millum Kirkjubøar kommunu og sunnara partin av Tórshavnar uttanbíggjar kommunu. Eitt betri dømi er, tá ið Skopun skuldi gerast serlig sókn.

Málið kom fyri løgtingið í 1897, men varð útsett til tingsetuna 1898[29]. Løgtingið samtykkir tá fylgjandi sóknarmark millum Sands og Skopunar sóknir: Úr Bævinsgjógv, eftir Marknaánni til omanfyri vegin millum Skopun og Sand, haðani í ein útnyrðing omanfyri vegin, um markið millum Fjalshaga og Skopunarhaga til norðurendan av Eldingi, síðani eftir Eldingi til Bugin, haðani eftir hæddini til Argisfoss og haðani í beinari linju, har Breiða rennur út í sjógv. Markið, sum ongastaðni fellur saman við hagamark[30], verður helst ongantíð sett í verk, tí í løgtingssetuni 1909 kemur marknamálið aftur fyri[19]. Tá verður markið sett soleiðis, og tað verður tað endaliga: Úr Bævinsgjógv, eftir Marknaánni til oman fyri vegin millum Skopun og Sand, haðani í ein útnyrðing oman fyri vegin til markið millum Fjalshaga og Skopunarhaga, eftir hesum mark-

inum, til Skopunarhagi og Søltuvíkarhagi koma saman og síðani eftir markinum millum báðar hesar hagarnar. Øll matrikulerað ogn innan- og uttangarðs, sum er ella kemur innan fyri markið, verður at skatta til Skopunnar sókn. Sjálvt í hesum føri er markið øðrvísi enn hagamarkið, tað er strekkið frá Bævinsgjógv til hagamarkið millum Fjalshaga og Skopunarhaga[30].

*Býtið av Nes sóknar kommunu.*

Eftir tí, sum fram er farið í løgtinginum, kann tað í býtinum av Nes kommunu sigast at vera óvanligt, at málið varð latið til fólkaatkvøðu, at sókn skuldi býtast og at markið millum tær nýggju kommunurnar, um atkvøðugreiðslan fall soleiðis út, ikki kom at fylgja hagamarki. Av frágreiðingini frammanfyri sæst tó, at løgtingið hevur býtt sundur undir tilsvarandi umstøðum, men tað, sum sermerkir hetta mál er, at allar tríggjar serumstøðurnar vóru í einum og sama máli.

Fólkaatkvøðan varð so hildin og úrslitið var[4]:

| Bygd | Valrætt | Ja | Nei | Bl. og ógyldugar | Í % av teim atkvøðurætt hava | | Í % av teim sum atkvøtt hava | | Luttøkan í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | Ja | Nei | Ja | Nei | |
| Æðuvík | 29 | 11 | 9 | 0 | 37,9 | 31,1 | 55,0 | 45,0 | 69,0 |
| Nes | 112 | 87 | 5 | 4 | 77,7 | 4,4 | 94,6 | 5,4 | 82,1 |
| Toftir | 287 | 179 | 41 | 5 | 62,0 | 14,3 | 81,4 | 18,6 | 78,3 |
| Saltnes | 50 | 32 | 2 | 0 | 64,0 | 4,0 | 94,1 | 5,9 | 68,0 |
| Rituvík | 148 | 9 | 77 | 2 | 6,1 | 52,0 | 10,5 | 89,5 | 58,1 |
| Runavík | 99 | 11 | 50 | 0 | 11,1 | 50,5 | 18,0 | 82,0 | 61,6 |
| Tilsamans ytri partur | 725 | 329 | 184 | 11 | 45,4 | 25,4 | 64,2 | 35,9 | 70,8 |
| Saltangará | 147 | 18 | 12 | 1 | 12,2 | 8,2 | 60,0 | 40,0 | 20 |
| Glyvrar | 150 | 26 | 21 | | 17,3 | 14,0 | 55,3 | 44,7 | 30 |
| Lamba | 72 | 2 | 2 | | 12,8 | 2,8 | 50,0 | 50,0 | 6 |
| Søldarfjørð | 155 | 5 | 5 | 2 | 3,2 | 3,2 | 50,0 | 50,0 | 8 |
| Tilsamans innari partur | 524 | 51 | 40 | 3 | 9,7 | 7,6 | 56,0 | 44,0 | 17,8 |

Valúrslitið vísir týðuliga, at valluttøkan var nógv størri í tí ytra partinum av kommununi, sum eisini natúrligt var, talan var um at býta henda partin frá. Ikki í øllum bygdum í ytra partinum var tó meiriluti fyri, Rituvík og Runavík atkvøddu greitt ímóti, meðan meira ivasamt var í Æðuvík. Har atkvøddi ein meiriluti av teimum, sum luttóku fyri, men ikki ein meiriluti av veljaratalinum.

Landsstýrið gjørdi av, at tær bygdir, har ein meiriluti av veljaratalinum atkvøddi fyri býti, skuldi leggjast saman í kommunu, meðan allar hinar bygdirnar skuldu leggjast saman í aðra. Eftir hesum vórðu Saltnes, Toftir og Nes samanlagdar, navnið á kommununi kom at vera Nes kommuna, meðan allar hinar bygdirnar komu undir hina kommununa, og varð navnið Runavíkar kommuna.

Markið millum kommunurnar er lýst í kunngerð nr. 42 frá 28. august 1967. Æðuvík er løgd úr Nes haga, Rituvík úr Yviri í haga og Mýrunum og Runavík úr Húshaga og Mýrunum, hesir tríggir seinastu hagarnir eru allir Toftahagar[31].

KELDUTILFAR


1. Løgtingstíðindi 1896 bls. 41—42.
2. Løgtingstíðindi 1911 bls. 94—95 og 1912 bls. 170—172.
3. Færøernes Kortlægning, København 1944, máliborðsblað 20 og 21.
4. Føroya landsstýri j. nr. 811—1, óprentað, liggur í skjalasavni landsstýrisins.
5. Løgtingstíðindi 1893 bls. 55—56, 1896 bls. 41—42, 1905 bls. 147—150, 1906 bls. 174—176, 1907 bls. 92—94, 1911 bls. 94—96, 1912 bls. 73—77, 1912 bls. 77—80, 1917 bls. 52—53, 1917 bls. 54—58, 1927 bls. 167—169, 1928 bls. 119, 1929 bls. 173—174, 1931 bls. 166—167, 1943 bls. 270—271, 1947 bls. 226—228, 1948 bls. 202—204.
6. Løgtingstíðindi 1912 bls. 73—77.
7. Løgtingstíðindi 1907 bls. 95—97, 1930 bls. 204—205, 1943 bls. 271—272.
8. Løgtingstíðindi 1912 bls. 77—80.
9. Løgtingstíðindi 1913 bls. 84—86.
10. Løgtingstíðindi 1924 bls. 116 og skjal 27, 1925 bls. 105 og skjal 5.
11. Løgtingstíðindi 1947 bls. 228—229.

12. Løgtingstíðindi 1918 B bls. 44—47.
13. Løgtingstíðindi 1920 bls. 132—133.
14. Løgtingstíðindi 1918 B bls. 169—170, 1919 B bls. 99.
15. Løgtingstíðindi 1924 bls. 124 og skjal 28.
16. Rigsdagstidende Tillæg A, Ord. Samling 1871—72, teigur 2315—2350.
17. Ordbog over det danske sprog, 20. bind, teigur 1301—1302, København 1941, Hagerups Konversations leksikon, 9. bind, bls. 295, København 1952, Kulturhistorisk Leksikon for nordisk middelalder, XVI bind, teigur 380—381, København 1971, Poul Petersen, Ein føroysk bygd, bls. 3, Tórshavn 1968.
18. Løgtingstíðindi 1898 bls. 36—41.
19. Løgtingstíðindi 1909 bls. 81—84.
20. Løgtingstíðindi 1929 bls. 175—176, 1930 bls. 204—205.
21. Løgtingstíðindi 1917 bls. 54—58.
22. Løgtingstíðindi 1947 bls. 228—229.
23. Løgtingstíðindi 1918 B bls. 168—169.
24. Løgtingstíðindi 1943 bls. 270—271.
25. Løgtingstíðindi 1929 bls. 173—174.
26. Løgtingstíðindi 1909 bls. 199—200, 1910 bls. 84—86.
27. Løgtingstíðindi 1912 bls. 25—27.
28. N. Andersen bls. 317.
29. Løgtingstíðindi 1897 bls. 95—96, 1898 bls. 36—41.
30. Færøernes Kortlægning, København 1944, máliborðsblað 37.
31. Færøernes Kortlægning, København 1944, máliborðsblað 28.

*Bjørk:* Færøsk Bygderet, 2den del, bls. 302—307.

## SUMMARY

The most recent *kommuna* (local authority district) to be subdivided according to the provisions of the Faroese Local Authority Act of 1872 is that of Nes ecclesiastical parish. The procedure is described in this article and illustrated with examples from the subdivision of other local authority districts. The unusual features of this latest subdivision — through isolated examples are known from certain earlier instances — were that a referendum was required for splitting an ecclesiastical parish; and that the boundary was not drawn to correspond with the territorial limits of the village commonwealths concerned.